## Lata herstøð aftur

Myndugleikarnir í miðasiatiska landinum Kirgisistan hava gjørt av at lata eina amerikanska herstøð har aftur. Avgerðin bleiv tikin, beint eftir at Russland hevði játtað Kirgigistan meiri enn 10 milliardir krónur í búskaparligari hjálp, skrivar AP. Amerikanska herstøðin í Kirgisistan hevur havt stóran týdning fyri USA og NATO í sambandi við kríggi í Afghanistan. Amerikanska uttanríkisráðið sigur seg harmast avgerðina hjá kirgisisku stjórnini at lata støðina aftur.



## Evran er skjøldur

Formaðurin í ES-nevndini, Jose Manuel Barroso, vísir aftur øllum tosi um, at fíggjarkreppan kann fara at gera enda á evrusamstarvinum. Í samrøðu við týska blaðið Die Zeit sigur hann, at evran er í veruleikanum ein verja ella ein skjøldur, sum verjir ímóti altjóða fíggjarkreppuni. Hann sigur seg vera sannførdan um, at uttan evruna hevði støðan í summum londum verið uppaftur verri, enn hon er. 16 lond eru við í felags evropeiska gjaldoyrasamstarvinum.

# Eingin fyrimunur við smáum skúlum



**- Tú kanst ikki spesialisera teg í at læra sjey árgangir at lesa og skriva. Tað heldur Fríðfinnur Johnsson, skúlastjóri í Leirvík. Hann saknar saklig og faklig argument í kjakinum um fólkaskúlan, og heldur harumframt, at vit áttu at tikið enska skúlabygnaðin til okkum**

SKÚLAMÁL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Størsta forsømilsið við fólkaskúlanum er, at tað ikki langtsíðan eru kanningar settar í verk, sum kanna fakliga grundstøðið hjá tí einkulta næminginum. Tað átti at verið gjørt fyri nógvum árum síðani, soleiðs at vit í dag kundi sitið og hugt eftir, hvat kanningarnar vísa. Tú má út at kanna, hvussu fakliga grundstøðið er hjá næmingunum í øllum Føroyum er, áðrenn tú tekur diskussiónina upp, fyri at fáa eitt sakligt kjak. Tað heldur Fríðfinnur Johnsson, sum er skúlastjóri í Leirvíkar Skúla.

Kjakið um fólkaskúlan er kyknað aftur, og meiningarnar eru eins nógvar, og tað eru fólk. Fríðfinnur Johnsson saknar tó sakligu argumentini í kjakinum.

- Nógv av argumentunum, sum eru at hoyra fyri at varðveita smáu bygdaskúlarnar, er tað reina nostalgi, ikki sakligt grundarlag, sigur Fríðfinnur Johnsson.

- Tað er líkamikið, hvar skúlin liggur. Tú tosar um, at fer skúlin úr bygdini, so doyr bygdarlívið. Meðan barnið er í skúla, skal innihaldið í skúlanum vera gott, og tá barnið fær frí úr skúlanum, er tað at bygdarlívið traðkar til. Eisini verður tosað um, hvussu flott umhvørvið uttanfyri bygdaskúlarnar er. Um ein næmingur situr í Leirvík, og sær hesa síðuna av fjallinum, ella um hann situr í Gøtu og sær hina síðuna av fjallinum, ger skúlan hvørki betri ella verri. Vit mugu taka eina diskussión um, hvat er gott fyri barnið, staðfestir Fríðfinnur Johnsson.

### Kanna førleikarnar hjá barninum

Ein av fortreytunum fyri at fáa eitt sakligt og fakligt kjak um fólkaskúlan og um smáar ella ikki smáar skúlar er, sambært Fríðfinni, at tú kannar grundleggjandi førleikarnar hjá næmingunum í øllum landinum.

Sjálvur heldur hann, at ein kanning sum Landsroyndin, ið er ætlað sum amboð og ítøkiligt grundarlag hjá myndugleikum, skúlum og foreldrum at fylgja við og meta um fakliga støðið í teirra egna skúla, umframt at kunna viðgera úrslitið í mun til fakliga støðið í øðrum skúlum í landinum, átti at verið gjørd fyri næmingarnar heilt niður í fyrstu flokkarnar, tí longu tá eru ábendingar um, hvussu næmingurin er fyri fakliga.

- Tú svíkir børnini, um tú ikki ger eina sakliga og fakliga eftirmeting, sum foreldur, skúli og samfelag kunnu brúka til nakað. Tað er simpult og kann gerast skjótt. Tú kannar næmingin eftir standardiseraðum normum, um hann, í basis, dugir tað, hann skal, so sum at lesa, skriva og rokna, greiður Fríðfinnur Johnsson frá.

Hann greiðir víðari frá, at tá tú so kannar børnini kring alt landið, kanst tú samstundis síggja, hvussu fráløran er í ymisku støðunum, og harfrá gera av, hvat er best fyri næmingin.

- Tá kanst tú eisini síggja, um næmingarnir eru betri ella verri fyri í smáum ella stórum skúlum og smáum og stórum flokkum. Man má gera eina kanning og